# Lívstíð fyri Engla-drápið

Ein 43-ára gamal svii fekk lívlangt fongsul fyri drápið á tíggju ára gomlu Engla í vár. Við í dóminum er eisini revsingin fyri drápið á einari 31 ára gamlari kvinnu í 2000 og neyðtøkuroynd. Dómurin varð feldur við rættin í Galun í einum serliga trygdum rættarsali í Stockholm. Málið byrjaði 5. apríl, tá Engla súkklaði heim frá fótbóltsvenjing. Men hon kom ongantíð vegin fram.Tann nú 43 ára gamli steðgaði Engla bert 300 metrar frá heimi hennara, gjørdi seg inn á hana og endaði ógerðina við at myrða tíggju ára gomlu gentuna.



# Met í tali av húsagangum

Talið av húsagangum er tað hægsta síðani Danmarks Statestik byrjaði at skráseta húsagangir í 1979. Danskar fyritøkur hava truplari og truplari við at klára seg fíggjarliga. Í september vórðu skrásettir 362 húsagangir, sum er 13% fleiri enn mánaðin undan, tá talið var 319. Støðið er hitt hægsta nakrantíð, samstundis sum tølini eru tillagað fyri sesongsveiggjum. Sum meðaltal per mánaða fyri alt árið var hæddarpunktið í 1993 við 292 per mánaða. So høgt eru tølini tó ikki komin fyri 2008 enn. Økingin umfatar so at siga allar vinnuvegir. Talið av tvingsilssølum fyri september var 265 móti 261 í august, svarandi til ein vøkstur upp á tvey prosent. Eisini hesi tølini eru tillagað fyri sesongsveiggjum, skrivar politiken.dk

# Misskiljing førdi til ólógligan útflutning

**Delta Seafood á Tvøroyri átti slógvið, sum varð útflutt við ongari løggilding í summar, men vit vóru í góðari trúgvi, sigur stjórin**

ÚTFLUTNINGUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Tað eru vit, sum áttu slógvið, sum varð útflutt fyrst í juli í summar við ongari góðkenning.

Tað staðfestir Magnus Jespersen, stjóri á Delta Seafood á Tvøroyri.

Men hann sigur, at tey vistu ikki betri enn at alt var í lagi og at tey sostatt vóru í góðari trúgv.

Í farnu viku hevur Sjónvarpið hjá Kringvarpinum nakrar ferðir havt eina søgu frammi um eina sending av slógvi, sum varð útflutt úr Vági, uttan at hava løggilding.

Men tann stóra gátan í øllum hesum málinum var, hvør átti slógvið og, hvør hevði flutt tað av landinum.

Nú staðfestir stjórin á Delta Seafood, at teir áttu slógvið. Tað stavar frá fiski, sum er virkaður á Delta Seafood á Tvøroyri og TG-Seafood í Hvalba og tað var Frystimiðstøðin, sum virkaði slógvi.

Teir hava ikki viljað sagt nakað alment um málið fyrrenn teir høvdu kunnað Heilsufrøðiligu Starvsstovuna og tað hava teir gjørt nú.

### Vildu loysa ein trupulleika

Magnus Jespersen sigur, at upprunaliga høvdu Delta Seafood og TG- Seafood eina avtalu við Føroya Fiskavirking á Tvøroyri um at Fiskavirking skuldi taka ímóti slógvinum frá teimum.

Men so varð Fiskavirking flutt til Vágs og tá blivu trupulleikar at arbeiða slógvi.

- Av tí sama bleiv slógvið ein trupulleiki hjá okkum og fyri at loysa tann trupulleikan, stovnaðu vit, saman við øðrum, smápartafelagið Frystimiðstøðin, sum síðani hevur útvega sær útgerð at virka slógv og sum heldur til í leigaðum hølum frá Faroe Cold Store í Vági.

Hann sigur, at einaferð umboð fyri Heilsufrøðiligu Starvsstovuna var á eftirlitsvitjan á Delta Seafood, høvdu tey tosað um ætlanina at virka slógv í Vági og tá fingu tey at vita frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, nevnda framleiðsla var ikki umfatað av matvørulógini, men vístu til eina danska kunngerð.

### Í góðari trúgv

Tí hildu tey ikki, at løggilding kravdust.

- Við hesum í huga fóru vit so undir at virka slógv í Vági og samstundis vóru keyparar og kunnaðu seg um framleiðsluna, sigur Magnus Jespersen.

Hann sigur, at útfrá hesum varð eisini ein last av virkaðum slógvi í góðari trúgv avskipað fyrst í juli mánaði.

- Men aftan á kom okkara egni góðskuleiðari eftir, at løggilding kravdust fyri at virka slógv og flyta tað av landinum.

- Tað kom óvart á okkum, men vit fóru so beinanvegin undir tilgongdina at søkja um løggilding.

- Men sostatt var tað ein misskiljing ímillum Delta Seafood og Heilsufrøðilgu Starvsstovuna,sum var orsøkin til, at slógv varð virkað og útflutt uttan løggilding, sigur Magnus Jespersen.

### Delta eigur ábyrgdina

Hann ásannar, at Delta Seafood hevur ábyrgdina av misskiljingini, men hann sigur, at tey síðani hava havt eitt gott samskifti við Heilsufrøðiligu Starvsstovuna og at løggildingin kemur í næstum.

Í hesum sambandi hevur Heilsufrøðiliga Starvsstovan havt nøkur nøkur krøv til Frystimiðstøðina, sum teir nú eru í ferð við at lúka og teir vænta at hava løggildingina seinni í hesum mánaðinum.

Í tíðindaskrivi í morgun staðfestir Magnus Jespersen, at hann er skelkaður av at málið, eftir hansara tykki, er lagt soleiðis fram í Kringvarpinum, at fólk kunnu sita eftir við teirri fatan, at Delta Seafood tilvitað hevur brotið lógina.

- Hvørki Delta Seafood, TG Seafood ella Frystimiðstøðin hava tilvitað brotið galdandi reglur. Talan er um eitt harmiligt mistak, sum vit á Delta hava gjørt og eisini taka fulla ábyrgd av. Vit hava eisini gjørt tað, ið krevst, fyri at mistakið ikki skal endurtaka seg, sigur Magnus Jespersen.

Hann staðfestir eisini í tíðindaskrivi, at Delta Seafood vil ikki vera partur í einum máli, sum tey tulka sum eina persónsjagstran av Johan Dahl, sum nú er landsstýrismaður, er ein av partaeigarunum í Frystimiðstøðini.

Tað, hann sipar til, er at í tíðindaflutninginm hevur tað verið nevnt, at Johan Dahl er ein av teimum, sum eigur Frystimiðstøðina.

Magnus Jespersen sigur, at Johan Dahl eigur 20% í Frystimiðstøðini og situr í nevndini, men sum vanligur nevndarlimur hevur hann sjálvandi als onki innlit í dagliga raksturin og hann afturvísir staðiliga, at Johan Dahl hevur nakað sum helst við hetta málið at gera, yvirhøvur.



*- Talan er um eitt harmiligt mistak, sum vit hava ábyrgdina av, men vit hava ikki tilvitað brotið nakra lóg staðfestir Magnus Jespersen, stjóri á Delta Seafood á Tvøroyri*

# Ov tíðliga við fólkaatkvøða um samanlegging í Suðuroy

**Tað er ongin meining í at hava fólkaatkvøðu um at leggja kommunurnar í Suðuroy saman fyrrenn veljarin hevur ein sáttmála at taka støðu til, sigur Kirstin Strøm Bech, borgarstjóri í Suðuroy**

SAMANLEGGING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Tað er ongin orsøk til at hava fólkaatkvøðu í Suðuroy beint nú um at leggja kommunurnar saman.

Tað heldur Kirstin Strøm Bech, borgarstjóri í Vági. Hon er sostatt ósamd við starvsbróðurin á Tvøroyri, Kristin Michelsen, sum mælir til at hava fólkaatkvøðu í Suðuroy um samanlegging, samstundis sum kommunustýrisvalið er.

Men Kirstin Strøm heldur at hetta er ov tíðliga.

Nakað síðani var fólkaatkvøða í Vági um samanlegging og har var ikki meiriluti fyri at leggja Suðuroynna í eina kommunu.

- Vágbingar hava longu einaferð sagt nei til eina kommunu og eg haldi ikki, at tað er nøkur orsøk til at hava eina fólkaatkvøðu afturat, fyrrenn veljarin hevur nakað ítøkiligt at taka støðu til.

Samstundis samtykti Vágs Býráð, at skulu kommunur í Suðuroy leggja saman, skal Suðuroy ikki leggjast saman í eina kommunu, men í tvær.

Men á almennum fundi í Vági í farnu viku, tó Kirstin Strøm Bech øll á bóli, tá ið hon kunngjørdi, at hon hevur broytt støðu og at hon nú tekur undir við, at øll Suðuroy verður ein kommuna.

Samstundis er hon bundin at samtyktini í Vágs Býráði um tvær kommunur til næsta val.

Tí heldur hon, at tað eiga at vera tey nýggju kommunustýrini, sum taka við á nýggjárinum, sum eiga at taka støðu til spurningin. Og taka tey undir við at leggja kommunurnar saman, eiga tey at fara undir tilgongdina.

Hon hugsar sær, at eftir kommunustýrisvalið, skulu nývaldu bý- og bygdaráðini taka støðu til samanlegging.

- Er undirtøka fyri tí, eigur ein arbeiðsbólkur at verða settur at gera eitt uppskot til ein yvirskipaðan sáttmála ímillum kommunurnar um, hvussu Suðuroy skal skipast á eldraøkinum, skúlaøkinum, brunaumsjónarøkinum, barnaansingarøkinum og á nøgvum øðrum økjum, eftir at allar kommunurnar eru lagdar saman.

Ein grundgeving ímóti at leggja saman er, at tað er so ójavnt, sum kommunur eru fyri fíggjarliga og at tað órættvíst, at kommunur, sum eru hampiliga væl fyri, nú skulu betala fyri skuld hjá øðrum kommunum?

- Tað er nettupp ein spurningur, sum arbeiðsbólkurin kann arbeiða við, sigur Kirstin Strøm Bech.

- Men skal negativa gongdin í Suðuroy vendast er tað neyðugt at gera nakað, leggur hon afturat.